# Herfloti Neptuns

## – herferð Paul Watsons til frama fyri heimsins høv




**1. partur**

*Raffi Khatchadourian,*
*The New Yorker*
*Týtt hevur Johan Jacobsen*

Ein kaldan eftirmiddag, veturin 2006, løgdu tvey skip stilt í nógvum ísi tætt við munnan til Ross Sea. Hetta er út fyri Antarktis. Sea Sheperd Conservation Society, ein sera virkin felagsskapur, ið fyri 30 árum síðan varð stovnaður av Paul Watson, eigur bæði skipini. Endamálið hjá felagsskapinum er at verja lívið í havinum ímóti teimum oyðileggjandi vanunum og menniskjans grískliga matarlysti. Watson við eini manning á 52 sjálvbodnum hevur ført bæði skipini – Farley Mowat, úr Avstralia, og Robert Hunter, úr Skotlandi – til Ross Sea við tí fyri eyga at bjarga hvalum í einum av teirra týðandi heimaumhvørvum. Fyri eini øld síðan silgdi Ernest Shackleton og hansara manning inn í Ross Sea-økið. Har sóu teir so nógvan hval, at teir kallaðu staðið Bay of Whales. (»Ein sonn leikalund fyri hesi monstur«, skrivaði Shackleton.) Gjøgnum tað mesta av 20. øld varð nógvur hvalur veiddur í økinum, og hvønn vetur siglir ein japanskur floti inn á øki á veiðu eftir sildreka og tí hótta finhvalinum. Watson heldur uppá at verja við valdi. Í fleiri áratíggjur hevur hann brúkt sín egna flota til at sigla á hvalabátar og fiskiskip á opnum havi. Ásigling er hansara eyðkendi taktikkur. Og tað var júst tað, sum hann og manning hansara ætlaðu at gera móti japansku skipunum hendan vetrardagin, tað var altso um teir kunnu finna tey.

Watson er 56 ára gamal, tættur og væl bygdur. Hárið er hvítt og hangur ofta niður fyri eyguni. Á ferðum til Suðurpólin letur hann vanliga eitt skegg ella høkuskegg vaksa. Hendan dagin, 19. januar, tá ið skipini løgdu stilt í Ross Sea, var hann í einari svartari troyggju, ið minti um eina hernaðarbúna, við Sea Shepard merkjum og so eitt belti í ælabogalitum við einum slíðraðum knívi. Watson var skipari á Farley, ein rustaður norðurhavstrolari, ið er bygdur í Noreg í 1958. Skipið er svart við gulari rípu, á stavninum er ein skøltur og tvey bein málaði út yvir, og á dekkinum harframmi liggur eitt amboð, ið teir kalla »dósaopnarin«: eitt spískur stáloddur, ið verður skotin út frá stýriborðsíðuni á skipinum og skal gera skaða og hol á skrokkin hjá fíggindaskipinum. Ætlanin hjá Watson hendan dagin var at flyta so nógv av innbúgv, útgerð og manning sum til bar úr Farley og yvir á Hunter. Hetta komst lutvíst av tí, at Farley er eitt gamalt skip, ið næstan ikki er sjóført, lutvíst tí at skipið siglir ólógliga og hald kann verða lagt á skipið, um tað leggur at í havn. Og so lutvíst fyri at rigga skipið til ásiglingarháttin, ið hann kallar »Operation Asshole«. Navnið kemur av, at ásiglingin berur fyrst við bakstevnið á hinum skipinum.

Tá ið Watson ikki hevur fast undir fótunum og er til sjós, ber hann seg at sum Nemo Kapteynur. Tað vil siga, at hann ger tað, sum hann heldur vera rætt, sjálvt um hetta fevnir um at bróta vanligar mannagongdir og oyðileggja aðrar ognir. Har eru fleiri lógir, ið grundleggjandi hoyra til nútíðar siðmenning, sum øsa hann og sum ikki sampakka við hansara fatan av morali. Herímillum er tann eina ST samtyktin, hon við heitinum »Convention on the Law of Sea«. Samtyktin slær fast, at sjálvstýrandi statir aleina hava rætt til at tryggja, at lógir har verða hildnar. Um nú slíkar lógir órógva ætlanirnar hjá Watson, so kunnu lógir verða lógir, sum eru til at bróta. Tá ið hvalir eru uppi í leikinum, er hetta serliga so. Watson heldur, at hvalir eru skynsamari enn menniskjað, og at hvalaveiða svarar til morð. (Hann hevur samanborið týningina av hvalum við Holocaust). Japanar hava hinvegin eitt annað sjónarmið. Síðan 1930ini hava teir veitt hval við einum nútímans ídnaðarflota, og tess meiri heimurin uttanfyri átalar teirra veiðu, tess meira tvørliga stuðlar japanska stjórnin veiðuni.Watson stendur fast við, at um mótstøðumenn hansara alment verða noyddir at verja teirra virksemi, koma mótstøðumenninir sjálvir at avdúka, hvussu ivasom og óhjálpin støða teirra er. Ein hornasteinur í hansara framferðar- og hugsunnarhátti er at trýsta málið ígjøgnum.

Hvalaveiða er ikki banna, men tó heldur ikki heilt loyvd. Hetta er ein ógreið støða, ið er úrslit av politiskum neyðsemjur og stuttskygni. Í 1946 stovnaðu stóru


THE NEW YORKER

NEPTUNE'S NAVY


*Hendan myndin er tikin í juni í 1986, tá løgreglan handtók tveir av manningini hjá Paul Watson. Tað sá rættiliga dramatiskt út, tá Bergleif Brimvík leyp niður í gummibátin og steðgaði motorinum*